gult30 cyan30 magenta30 svart30



# Eysturoyingar & Norðstreymoyingar

## Skiljing av ruski við hús

| Grái posin | Hvíti posin | Grøni posin |
|---|---|---|
| • Aluminiumsfolia | • Brævbjálvar | • Battarí |
| • Blikk | • Dagbløð | • Eitur |
| • Blómur | • Eggjabakkar | • Láorkuperur |
| • Blæur og bind | • Hefti av ymsum slag | • Ljósrør |
| • Breyðleivdir | • Innballingarpappír | • Loysingarevni |
| • Breyðposar | • Kopipappír | • Lútur |
| • Dálkað pappír | • Lýsingarbløð | • Máling |
| • Døgurðaleivdir | • Papp | • Oyðingarevni |
| • Einnýtis borðbúnaður | • Pappír | • Spillolja |
| • Fruktleivdir | • Papprullur | • Spraydunkar |
| • Grønmetisleivdir | • Prentarapappír | • Sýra |
| • Juicepakkar | • Skrivipappír | • Termometur |
| • Kaffifiltur | • Smápakningur | |
| • Matleivdir | • Smáar pappeskjur | |
| • Mjólkapakkar | • Teknirøðir | |
| • Plast av øllum slag | • Tíðarrit | |
| • Skitið pappír | • Vikubløð | |
| • Vattpinnar | | |
| • Vátt pappír | | |

**Pappír og papp skal vera reint og turt.**
**Stórir lutir, stórar pappeskjur og stórar nøgdir av lívrunnum burturkasti skulu latast inn á bingjuplássini.**

| Nær verður hvíti posin heintaður fyrstu ferð? | Vika nr | Dato |
|---|---|---|
| Nes-, Runavíkar-, Skála-, Oyndarfjarðar-, Gøtu- og Fuglafjarðar kommuna | 22 | 28. til 31. mai |
| Norðstreymoy og Eysturoy annars | 23 | 5. til 8. juni |

IRF

www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo

# Vinn eina fótbóltsferð




Elsta fótbóltsfelagið í Danmark, KB, fyllir í ár 125 ár, og í hesum sambandi skipar felagið ígjøgnum árið fyri til[…] av ymsum slag.

Eitt av hesum tiltøkum verður ein dystur ímillum FCK og[…] Nú geva Sosialurin og Atlantic Airways tær møguleika fy[…] vinna eina ferð fyri tvey til dystin.

## Kappingarreglur:

Frá týsdegnum, 3. apríl og 15 bløð fram verða puntar, sum til samans geva eina fullfíggjaða mynd av einum kendum fótbóltsandliti, at finna í Sosialinum. Fyri at luttaka í kappingini ræður um, at hava savnað alla[…] puntarnar saman, soleiðis at fullfíggjaða myndin kann setast saman. Tá hetta er gjørt, skal blaðsíða 65 i fótbóltsblaðnum, sam[…] við teimum 15 puntunum, sum eru savnaðir sendast til okkum. Seinasta freist fyri innlatan av hesum[…] fríggjadag 4. mei. Vinnararnir av fótbóltsferðini verða kunngjørdir í Sosialinum týsdagin, 8. mei.

Loyvt er ikki at senda inn avrit av síðuni ella av puntunum, sum skulu setast í s[…]

## Dagsins teigur



Vegna prenttrupuleikar í gjár, prenta við puntin sum var í blaðnum í gjár umaftur. Sosialurin






gult31 cyan31 magenta31 svart31



FILMSTEIGURIN

# The Mexican

Jerry hevur eitt val. At fara til Mexico eftir einum sjáldsomum revolvara/-pistóli… og fáa sekkin frá damuni Samanthu. Ella at fara við Samanthu til Las Vegas… og vera sokkin langt niður í havsins botn, við sementi um føturnar. Jerry velur at fara til Mexico.

Jerry er ikki ein brotsmaður, men hann situr í skuld. Hann er ikki akkurát ein harður persónur, og hann er ikki akkurát sera kønur viðvíkjandi Mexico. So uppá fáir tímar gerst alt til ein stóran ruðuleika. Millummaður hansara er deyður, bilur og pengar verður stolið frá honum – pluss tann virðismmikli revolvarin »The Mexican«.

Kanska er tað satt, at revolvarin er forbannaður. Í hvussu so er gerst støðan hann er í einans verri, tá ið brotsmenninir fyri sikkurheits skuld taka Samanthu til gíðsla. Hon og Jerry elska hvønn annan ov nógv til, at vilja skiljast. Jerry roynir, í vónloysi at fáa fatur á revolvarinum í tí heita Mexico, finnur hann, missur hann aftur, og…

»The Mexican« er ein romantiskur skemtifilmur við Julia Roberts og Brad Pitt í oddanum, sum bæði eru á hvør sínari ógvuliga truplari ferð, sum kanska kann sameina tað forelskaða parið. Um tey so klára at sleppa av við forbannilsir, »bandidos«, hevndarhugaðir brotsmenn og leigumordarar. Tað er Gore Verbinski ið hevur leikstjórna filmin. Hann verður frumframsýndur í Havnar Bio í kvøld.





# Titans

I Alexandria í tí amerikanska suðurstatinum Virginia á T.C. Williams High Schools ganga tey nógv upp í fótbólt og lið teirra The Titans.

Vit eru í árinum 1971 har tann lokala skúlanevndin er vorðin rakt av einari nýggjari intigratión, sum noyðir teir til at samanleggja bæði tann hvíta highscool og tann svarta highschool í býnum.

Hetta verður ikki dámt í tí lítla samfelagnum, sum er gjøgnumsýra av fordómum og intoleransu í báðum pørtunum.

Spælarnir protestera eisini: Kappingin at verða á vøllinum er vorðin størri- bæði hjá teimun hvítu og teimum svørtu.

Í hesari støðu velur ein at taka tann svarti mannin Herman Boone (Denzel Washington) til Alexandria, sum fær starvi sum fyrstivenjari hjá The Titans, í staðin fyri tann hvíta Bill Youst (Will Patton).

Titans er eisini søgan um Boone upp í móti Yoast – um tveir viljasterkar, ærukærar málførar menn, sum læra at samarbeiða og til síðst, eitt vinalag.

Javnsett fylgja vit eisini gongdini millum áleypararnar Julius »Big Ju« Campbell (Wood Harris), sum er myrkur, og Gerry Bertier (Ryan Hurst), ið er hvítur. Í fyrstuni er hatur teirra millum, men seinni mennist samband teirra til satt vinarlag.

Her er tosan um ein filmur sum setur fokus á tey klassisku demokratisku skipan um frígering, líkskapur og bróðurlag.

Filmurin byggir á eina sanna søgu, og tað skapar styrkina í filminum.

The Titans vunnu dyst aftaná dyst, og tað eydnaðist teimun til síðst at fáa meistaraheiti.




**Frumsýning**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 27.04. kl. $20^{30}$ | | Fríggjadagin | 27.04. | kl. $23^{30}$ |
| Leygardagin | 28.04. kl. $20^{30}$ | | Leygardagin | 28.04. | kl. $23^{30}$ |
| Sunnudagin | 29.04. kl. $19^{30}$ | | Sunnudagin | 29.04. | kl. $22^{00}$ |

**www.in.fo/havnarbio**

# HAVNAR BIO

Tlf. 3119 56




| | | | |
|---|---|---|---|
| Fríggjadagin | 27.04. kl. $19^{00}$ | Fríggjadagin | 27.04. kl. $21^{00}$ |
| Leygardagin | 28.04. kl. $19^{00}$ | Leygardagin | 28.04. kl. $21^{00}$ |
| Sunnudagin | 29.04. kl. $22^{15}$ | | |




**Frumsýning**

Fríggjadagin 27.04. kl. $23^{00}$ Leygardagin 28.04. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 29.04. kl. $20^{00}$

**KOMANDI FILMAR**




**Frumsýning Fríggjadagin 04.05.**




**Frumsýning Fríggjadagin 04.05.**